Ítróttar Sosialurin



## Brasiliumenn til B71

Sandoyingar skulu komandi ár royna seg í Formula-deildini, og fyrireikingarnar at styrkja um liðið eru komnar væl áleiðis. Fyrr í vikuni boðaði felagið á heimasíðu sínari frá, at liðið nú verður styrkt við enn tveimum brasiliumonnum. Teir eru Flavio Lucio Silva De Santana og Fabio Bieira, sum spæla á ávíkavist miðvøllinum og í verjuni. Hinvegin tykist felagið missa Bergleif Sólsker og Jákup Sørensen, sum helst gevast við fótbóltinum fyribils.

## Lítli Laudrup í Ajax

Andreas Laudrup, sonur navnframa Michael, skal nú til Ajax at royna seg. Hollendska stórfelagið vildi enntá eisini hava eldra beiggjan, Mads, til eitt venjingaruppihald, men hesum hevur felag hansara, FCK í fyrsta umfari noktað. Ikki óvæntað hava teir báðir beiggjarnir framúr fótbóltsevni, og í Danmark eru nógv, sum seta stórt álit á framtíðar fótbóltsmenning teirra. Sum eitt kuriosum kann nevnast, at bæði Michael og Brian Laudrup eisini hava spælt í hollendska felagnum.



*Endaspælið hjá kvinnum byrjar um vikuskiftið. Við byrjunarstøðuni í huga kann roknast við toppdysti mest sum hvørt vikuskiftið. Fyrsti av hesum verður í Trongisvági*



TB-SÍ:

# Toppdystur í Trongisvági

**Toppdystur verður í meistaradeildini hjá kvinnum í høllini í Trongisvági í fyrsta umfarið av endaspælinum, har TB tekur ímóti SÍ. Ein sigur er krav hjá báðum fyri at halda fast í oddaliðunum.**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Nú er grundspælið komið at enda í meistaradeildini hjá kvinnum, og fyrsta umfar av endaspælinum verður á skránni í vikuskiftinum. Her skulu øll liðini í dyst, og ein av dystunum er sannur toppdystur, tá TB og SÍ, sum liggja á ávíkavist triðja og fjórða plássi, bresta saman í Trongisvági. Tey eru bara eitt stig aftanfyri bæði oddaliðini, og tí er umráðandi fyri bæði at vinna dystin, fyri at hanga í oddinum.

Gongdin hjá heimaliðnum hevur ikki verið tann besta síðstu dystirnar. Í síðsta dystinum í grundspælinum høvdu tær møguleika at leggja seg á odda í deildini, men tær máttu taka til takkar við fyrsta tapinum á heimavølli í ár.

Hava síðstu dystirnir verið minni góðir hjá TB, so hava teir verið sera góðir hjá SÍ. Alla kappingina hevur SÍ ligið nøkur stig aftan fyri hini trý oddaliðini, men við einum øgiligum endaspurti í grundspælinum eru tær nú bert eitt stig aftanfyri oddaliðini, nú endaspælið verður skotið í gongd. Síðstu tríggir dystirnir eru endaðir við sigri til sørvágskvinnur, og her hava tær m.a. vunnið á bæði TB og ÍF.

Hesi bæði liðini hava eisini spælt tveir dystir ímóti hvørjum øðrum í grundspælinum. Tann fyrsti var í Trongisvági, har TB vann sannførandi 3-0 sigur. Í hinum dystinum megnaði SÍ at vinna á heimavølli, so higartil hava liðini verið sera javn.

Hesin dysturin verður tó í endaspælinum, og tá telja stigini meir enn í grundspælinum. Tí er umráðandi hjá báðum at vinna, so at tey kunnu fá eina so góða byrjan sum møguligt upp á endaspælið. So áskoðararnir á Tvøroyri kunnu vænta ein spennandi dyst í Trongisvági, tá tvey av oddaliðunum bresta saman leygardagin.

ÍF-KÍF:

## ÍF skal halda oddasessinum

**ÍF skal halda fast um góða støðuna í meistaradeildini hjá kvinnum, tá KÍF kemur á vitjan. Hjá KÍF kemur endaspælið væl við, tí nú fáa tær nýggjan møguleika at røkka heiðursmerkjum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Besta kvinnuliðið hjá ÍF í flogbólti hevur havt eitt sera gott kappingarár higartil. Sjálvt um kappingin hevur verið sera jøvn, so gjørdist ÍF vinnari av grundspælinum, so tær eru á odda, tá liðini fara undir endaspælið. Gongdin hjá ÍF hevur eisini verið góð síðstu dystirnar. Gaman í blivu tær hølvaðar av næstseinasta dyst í grundspælinum, tá SÍ vitjaði á Kambsdali, men í síðsta dystinum fingu tær veruliga uppreisn. Tá møttu tær TB í Trongisvági, og her gjørdi ÍF ikki mætari enn at vinna 3-0.

Nú ræður um hjá ÍF at halda góðu gongdini frá grundspælinum, tá tær møta einum av botnliðunum, KÍF.

Hjá KÍF hevur eisini gingið rætta vegin síðstu dystirnar. Síðstu tríggjar dystirnar hava tær vunnið ein, meðan tveir eru taptir eftir javnbrótara. Endaspælið kemur væl við hjá kollfirðingum, tí nú eru stigini hálveraði, og við hesum fáa tær ein nýggjan møguleika at leika seg fram í oddin.

ÍF-Fram:

# ÍF skal varðveita oddasessin

**Fyrr í vikuni vann ÍF tryggan sigur á Fram í Hoyvík. Nú møtast liðini á Kambsdali í fyrsta umfari av endaspælinum, og Fram skal vísa aðrar taktir, um teir skulu basa ÍF**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Nú er grundspælið farið aftur um, og liðini í meistaradeildini hjá monnum kunnu byrja at hugsa um endaspælið. Nú telja stigini veruliga, og tí er umráðandi hjá øllum at fáa eina góða byrjan.

Longu í fyrsta umfari verður toppdystur á skránni, tá oddaliðið, ÍF, tekur ímóti Fram á Kambsdali. Undan dystinum liggur Fram á triðja plássi, og bert trý stig eru á muni á liðunum.

Gongdin hjá ÍF hevur verið sera góð í ár. Longu frá fyrsta dysti var greitt, at ÍF ætlaði sær at enda í oddinum í ár. Teir vunnu fyrstu fýra dystirnar, so taptu teir fyri Mjølnir, men eftir hetta hava teir vunnið allar dystirnar. Teir gjørdust eisini vinnarar av grundspælinum í bestu mansdeildini.

Hjá Fram evur hinvegin ikki gingið heilt eftir vild. Undan kappingini var nógv væntað av Fram, og teir hava eisini partvís livað upp til vónirnar. Teir liggja á triðja plássi, men gongdin kundi verið betur. Nú er endaspælið tó byrja, og stigini hjá feløgunum eru hálverað, so nú hevur Fram ein góðan møguleika a leika seg longur fram á stigatalvuni.

Hesa bæði liðini hava eisini møtt hvørjum øðrum tvær ferðir fyrr í ár, og í báðum førum vann ÍF rættiliga trygt. Fyrsta dystin vunnu teir 3-1 á Kambsdali, meðan seinni dysturin var fyrr í vikuni, har ÍF vann 3-0 í Hoyvíkshøllini.

Fram fær tó ein møguleika at minka um munin up til ÍF. Kravið er tó ein sigur á Kambsdali, tí vinna teir ikki, so er munurin helst ov stórur upp til ÍF. Hjá ÍF ræður um at vísa spælið, sum teir hava víst síðstu dystirnar, tí teir mugu undir øllum umstøðum metast at vera favorittar.